# Søgan endurtók seg enn eina ferð

## FAKTA UM DYSTIN

**Føroyar-Malta 3-2 (2-0)**
**Vinardystur**
**Mikudagin 18. aug: 2004, kl. 19.00 á Svangaskarði**
1-0: Jákup á Borg 32.
2-0: Rógvi Jacobsen 42.
2-1: Stefan Giglio 50.
2-2: Michael Mifsund 66.
3-2: Fróði Benjaminsen 79.
**Dómaratrio úr Danmark:** Emil Laursen, Bo Abildgaard og Jesper Petersen
**4. dómari:** Birgir Sondum
**1.932 áskoðarar**
**Føroyar:** 1. Jens Martin Knudsen, NSÍ, 62/-159 — 3. Pól Thorsteinsson, B36, 33/0 (3. Johan B. Hansen, AC Horsens, 10/0, 63.), 13. Óli Johannesen, TB, liðformaður, 66/1, 5. Jón Rói Jacobsen, BK Frem, 16/0, 2. Súni Olsen, GÍ, 14/1 — 9. Jákup á Borg, HB, 33/2 (18. Jónhard Frederiksberg, Skála, 3/0, 63.), 7. Fróði Benjaminsen, Fram Reykjavík, 26/2, 8. Julian Johnsson, ÍA Akranes, 56/4, 6. Rógvi Jacobsen, HB, 26/4 — 10. John Petersen, B36, 53/6, (12. Andrew av Fløtum, Fremad Amager, 13/1, 63.) 11. Hjalgrím Elttør, Fremad Amager, 12/0 (14. Jann Ingi Petersen, Fremad Amager, 10/0, 85.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Bárður Johannesen, HB, 0/0, 15. Atli Danielsen, KÍ 4/0, 17. Kári Nielsen, HB, 1/0
**Gult kort:** Óli Johannesen 40., Jákup á Borg 55., Rógvi Jacobsen 64., Fróði Benjaminsen 82.
**Venjari:** Henrik Larsen
**Hjálparvenjari:** Jógvan Martin Olsen
**Liðleiðari:** Birgir Hansen
**Lækni:** Jens Pauli Marstein
**Fysioterapeutar:** Álvur Hansen og Øssur Steinhólm
**Malta:** 1. Mario Muscat, Hibernians FC, Paola, 56/0 — 4. Peter Pullicino, Hibernians FC, Paola, 2/0, 5. Brian Said, Sliema Wanderers, 49/2, 6. Luke Dimech, liðformaður, Mansfield Town FC, England, 29/1, 3. Steve Wellman, Floriana FC, Valletta, 3/0 (15. Ian V. Azzopardi, Floriana FC, Valetta, 7/0, 46.) — 2. Roderick Briefa, Birkirkara FC, 2/0, 8., Sliema Wanderers, 37/2, 11. Antoine Zahara, Birkirkara FC, 41/1, 7. Ivan Woods, Pieta Hotspurs, 7/0 — 10. Andrew Cohen, Hibernians FC, Paola, 1/0 (18. Etienne Barbara, Marsaxlokk FC, 6/2, 72.), 9., Lillestrøm SK Noreg, 31/10
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Claude Mattocks, Sliema Wanderers, 4/0, 12. Saviour Darmanin, Pieta Hotspurs, 5/0, 13. Gilbert Agius, Valletta FC, 76/6, 14. Adrian Pulis, Hibernians FC, Paola, 0/0, 17. Antoine Zahara (yngri) Hibernians FC, Paola, 6/1
**Gult kort:** Brian Said 25.
**Venjari:** Horst Heese
**Hjálparvenjari:** Carmel Busuttil



**Tað var av kambinum og í dalin og so uppaftur, tá ið tað við rimmar fluktara eydnaðist at fáa væl uppiborna sigursmálið**

FØROYAR-MALTA
*Jóannes Hansen*

Søgan endurtekur seg. Soleiðis verður ofta tikið til, og soleiðis er tað. Eisini í fótbólti. Tað var gongdin á Svangaskarði mikukvøldið staðfesting av. Føroyar vunnu 3-2. Tá ið spælararnir fóru at hvíla seg, tóktist spurningurin bara vera, hvussu stórur heimasigurin fór at verða. Akkurát soleiðis var tað fyri sjey árum síðani, tá ið Malta vitjaði. Sum hesa ferð so var støðan ta ferðina 2-0, tá ið tað var hálvrunnið. Ta ferðina kom føroyska liðið í satt ódnarveður beinanvegin eftir steðgin. Tað endaði 2-1, og orsøkin varð mett at vera, at Føroyar beinanvegin í 2. hálvleiki høvdu mist ein mann.

Hesa ferð komu Føroyar beinanvegin eftir steðgin í ódnarveður. Leiðslan hvarv sum døgg fyri sól, og eina løtu vóru ongar ábendingar um, at tað skuldi eydnast at vinna. Heldur var spurningurin, um tað fór at bera til at halda tørn um javnleikin. Men so mannaðu heimamenninir seg uppaftur, skoraðu sigursmálið, og um fleiri mál høvdu verið skorað, so hevði tað verið upplagt, at tey fóru ígjøgnum hjá ikki serliga stóra og sannførandi Malta málverjanum.

Hvørki liðið plagar at seta dagsskránna. Tá ið møguleikin nú var har, tóktist tað vera torført. Eftir føroyskt trýst og málmøguleika í fyrsta álopinum og onkrar afturat stutt eftir, yvirtóku maltesarnir meiri. Liðformaðurin, Luke Dimech, var stinnur í miðverjuni, Antoine Zahara var stýrimaður á miðvøllinum, og Michael Mifsund, sum dagliga spælir í Lillestrøm, var so mikið skjótur álopsspælari, at tað var gott, at Jón Rói Jacobsen var komin afturíaftur í miðverjuni, har hann ikki gjørdi eitt mistak.

Maltesarnir vístu seg í 1. hálvleiki at vera bólttryggari enn heimamenninir, men teir spældu seg ikki til nógvar málmøguleikar, og í avspælinum gjørdu teir stór mistøk, sum bóru møguleikar fyri snarálopum við sær.

Í staðin fyri Toda Jónsson var Hjalgrím Elttør undir liðini á John Petersen í fremstu røð. Kanska eitt sindur óvæntað, tí mótstøðuverjan var ikki av teimum, sum áður hava lagt á blik, at John og Andrew av Fløtum ikki hava neyðuga skjótleikan.

Føroyski miðvøllurin stríddi seg til yvirvág. Julian tuskaði og arbeiddi alla tíðina, Fróði vann nógv og var tryggari í avspælinum, uttan at hann kortini tóktist so væl fyri, sum hann onkra ferðina hevur verið, og í borðunum løgdu Jákup og Rógvi onkra ferðina innfyri.

Súni Olsen hevði ikki fingið møguleikan so frammarlaga, sum tað á hesum síðum var róð frammundir. Hann fekk ongantíð møguleikan fyri at royna úti frá og ímóti málinum, hann var ikki so ofta við í gjøgnumbrotum, men tá ið hann legði langar sendingar vóru tær rættuliga neyvar, hann var meistari í deyðbóltsstøðum, og hann var við í báðum málunum í 1. hálvleiki.

Í fyrra førinum kastaði hann langt inn úr vinstru, Julian vann luftstríðið, og miðverjin kiksaði so mikið, at John fekk roynt ímóti málinum. Royndin varð blokerað, bólturin støkk til púra leysa Jákup á Borg, sum úr eitt sindur í høgru setti í handara síðunetið.

Málið lyfti føroyska liðið, sum vann nærdystirnar, men sum hevði trupulleikar í samanspælinum. Ov ofta vóru sendingarnar ikki nóg neyvar, temjingarnar vóru ikki nóg neyvar, og ov ofta tók tað ov langa tíð at orientera seg. Flatar og neyvar sendingar í dýpdina vóru rárar, og tað tóktist sum um Súni Olsen hevði væl betri eyga fyri síðuskiftunum, enn aðrir høvdu tað. Eitt sovorðið var orsøkin til seinna málið. John Petersen snittaði víðari við høvdinum, Jákup á Borg gjørdist enn eina ferð leysur í høgru, har Malta verjan hevði stórar trupulleikar at finna røttu støðurnar, og eftir at skotroyndir frá bæði Hjalgrími og John vóru blokeraðar, vísti Rógvi Jacobsen enn eina ferð, hvussu gott tev hann hevur at vera røttu løtuna á rætta staðnum.

### Dalurin

Fyrra partin av seinna umfarinum fór føroyska liðið heilt í dalin. Samanspælið datt sundur, summir meiri ella minni meldaðu seg burturúr, og nú tóktist tað sum um, at tað vóru mótstøðumenninir, ið settu dagsskránna. Tíðliga í 1. hálvleiki hevði onnur av vandamiklu atsóknunum hjá Malta verið, tá ið miðvallarin Stefan Giglio fluktaði av brotsteigarmarkinum eftir hornaspark. Hann var púra blankur, tá ið hann fekk sama møguleikan í 2. hálvleiki, og bólturin streyk í málið.

Málið lyfti Malta uppaftur meiri, og miðskeiðis í 2. hálvleiki var aftur galið. Tvørsending hjá Juliani eitt sindur aftanfyri miðstrikuna kiksaði, og Mifsud hevði merkiliga lætt spæl, tá ið tað eydnaðist honum at draga eitt vet inn um brotsteigarmarkið og eitt sindur úr høgru at smekka upp undir nettakið við nærra stólpan.

Hetta tóktist ov lætt, og føroyska liðið var skelkað og um at kollsigla. Tað regnaði eitt sindur í 2. hálvleiki, og onkrir spælarar høvdu trupulleikar á tættklipta og sjáldsama slætta undirlagnum. Óli hevði undan steðginum sæð gult fyri at halda, og tá ið hann aftur hevði hug at toga í onkra troyggju, kundi tað verið so skjótt, at eitt sindur erkvisni danski dómarin fór í lumman, men tað gekk. Hann og allir hinir komu bæði so og so undan við skrekkinum.

*Rógvi Jacobsen sýndi mikudagin enn eina ferð, hvussu gott tev hann hevur at vera røttu løtuna á rætta staðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Sigurin

Eingin ivi var um, at Føroyar og føroyingar vildu vinna og harvið prógva, at FIFA styrkislistin hevur verið misvísandi. Søgan endurtók seg. Sum í báðum royndunum fyri sjey árum síðani eydnaðist tað.

Tríggir nýggir menn komu á vøllin, tá ið seinna umfarið var knappliga tjúgu minuttir gamalt. Jónhard Frederiksberg var skjótur og umhugsin, og eisini Andrew av Fløtum fall beinanvegin væl inn í samanspælið. Higartil hevur tað ikki eydnast Hjalgrími Elttør at skjóta mál á landsliðnum. Hann hevur havt møguleikar ímóti Týsklandi, Skotlandi og eisini aðrar møguleikar. Hesa ferð fekk hann risa møguleika eitt sindur í høgru, men hann tøvdi og varð takladur.

So var tað, at Fróði Benjaminsen syrgdi fyri sigursmálinum. Súni Olsen legði innfyri, bólturin varð stútaður út um brotsteigarmarkið, Fróði sveiggjaði vinstru kølluna, og umvegis stólpan brast bólturin í netið. Málið hevði sama støðið, sum tá ið Todi fyri sjey árum síðani á Malta sveiggjaði vinstra beinið og í evstu løtu skoraði sigursmálið.

Tað var farið at skýma, og tað hevði kenst eitt sindur troystarleyst í fínregninum og maltesisku útjavningini. Áskoðarafjøldin hevði verið reserverað, men síðsta korterið vaknaði hon orduliga. Tað var sum fyri sjey árum síðani, tá ið Føroyar vunnu við einum máli á Malta. Søgan endurtekur seg, og mikukvøldið gjørdi hon tað í fleiri lutum.



*Føroyski miðvøllurin hevði tað ikki altíð lætt, men við knallhørðum arbeiði megnaðu Julian og Fróði tó at stríða seg til týdningarmiklu yvirvágina*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

TEMPUR nú hjá IDEmøblum



÷15% í august*

BYRJANAR TILBOÐ
framúrskarandi Tempur madrassurnar

Við Tempur madrassuni fært tú ein róligari og djúpari svøvn, tí tú vendir tær munandi minni um náttina. Tað gevur tær meiri yvirskot at njóta tað, sum er vert at njóta.

Nýt hetta høvið og fá tær kollveltandi madrassuna fyri minni kostnað í august mánaði.



TEMPUR RÁÐGEVI VITJAR
Leygardagin 21. august millum klokkan 10 og 14 ber til at fáa góð ráð og vegleiðing frá Tempur ráðgevanum, ið vitjar Idé møblar
*Royn okkara rúmdarkliva og droym um ein betri svøvn.*

*Avslátturin er galdandi fyri úrvaldar madrassur.

Tempur er eitt toyggiligt, hitaávirkiligt evni av smáum, opnum rúmum, ið fylgja umhvarvinum hjá kroppinum. Opnu rúmini lata luft streyma gjøgnum madrassuna, so kropshitin verður varðveittur. Madrassin flytir seg varliga við kropsins landslagi, so fullkomin stuðul verður givin, uttan at tað elvir til móttrýst.

TEMPUR
MADRASSUR OG PÚTUR SUM LÆTTA UM
www.tempur.dk

IDEmøblar
Uppi á Hálsi, Tórshavn, Tel 354680

| | |
|---|---|
| Mánadag - hósdag | 9.00 - 17.30 |
| Fríggjadag | 9.00 - 18.00 |
| Leygardag | 10.00 - 14.00 |